A
1/5. Miss ikki mótið, hvussu fer!
E A
Harrin skal hjálpa tær.
A
Undir hans náðiveingjum verð!
E A
Harrin skal hjálpa tær.

Niðurlag:
D A
Harrin skal hjálpa tær,
E
hvønn lívsins dag
E A
á hvørjum stað,
A H Cis
Harrin skal hjálpa tær,
D E A
Harrin skal hjálpa tær.

2/5. Gjøgnum hvønn myrkan, trongan dag
Harrin skal hjálpa tær;
er vandin stórur, gloym ei tað:
Harrin skal hjálpa tær!

3/5. Alt, ið tær tørvar, gevur hann;
Harrin skal hjálpa tær!
Trúgv honum, ei hann svíkja kann!
Harrin skal hjálpa tær.

4/5. Einsligur, skildur vinum frá -
Harrin skal hjálpa tær!
Frið skal hitt tyngda hjartað fá!
Harrin skal hjálpa tær.

5/5. Hvussu so hørð, ið royndin er,
Harrin skal hjálpa tær;
hvíl í hans favni, hann teg ber!
Harrin skal hjálpa tær.

**Civilla Durfee Martin, f. 1904.*
*(V. Danielsen týddi).*